# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ÓKEYPIS BLAÐ FRÁ SOSIALINUM

Við postinum í kvøld fær hvørt húski í landinum nýggja ókeypis blaðið, Mánaðarblaðið, sum Sosialurin gevur út.

Tað er einki dulsmál, at kappingin á miðlaøkinum í Føroyum er og hevur verið hørð seinastu árini. Hugtakið »blaðdeyði« kom fram úti í heimi fyri nógvum árum síðani, tá aðrir miðlar fóru at kappast við siðbundnu bløðini. Hendan kappingin tók dik á seg við internetinum. Men hóast broyttar fortreytir, so skal blaðdeyðin ikki skiljast sum tann totali deyðadómurin yvir bløðini. Vit varðveita sjálvsagt prentað bløð í øllum førum í mong ár framyvir.

Men tað verður sjálvandi við broyttum fortreytum. Tí er tað, at vit í Miðlahúsinum hava lagt so stóran dent á at vinna okkum út á aðrar miðlapallar. Fyrsta stigið var InternetSosialurin, sum longu hevur 13 ár á baki. Sum ein víðarimenning av skjótum tíðindum á internetinum fóru vit í samstarv við Føroya Tele um Portalin, sum man verða ein av heimsins mest vitjaðu tíðindamiðlum sæð í mun til fólkatalið. Vikuliga vitjunartalið liggur um 70.000.

Triðja stigið var útvarpsstøðin Rás2, sum Sosialurin keypti fyri trimum árum síðani.

Slíkt fjølbroytni er fyritreytin, um eitt miðlahús skal rekast á vinnuligum grundarlag. Tað hevur tó stórar broytingar við sær fyri starvsfólk, sum skulu venja seg við at arbeiða við fleiri miðlum í senn, og tað krevur ørðvísi planlegging.

Við nýggja Mánaðarblaðnum, sum verður borið út við Posta í kvøld, hevur Sosialurin eisini sítt egna lýsingarblað - og soleiðis kunnu vit bjóða kundum okkara ta tænastuna - at koma í hvørt hús í landinum.

Seinastu árini eru fleiri royndir gjørdar við slíkum ókeypis bløðum, eins og Dimmalætting í fleiri ár hevur borið eitt blað um vikuna í hvørt hús. Tað er kanska ringt at siga, at hetta eru væleydnaðar royndir, tí úrslitini hjá hesum fyritøkum hava ikki verið góð. Men við mánaðarblaðnum hava vit valt eitt ørðvísi




konsept, sum fyribils kemur eina ferð um mánaðin í hvørt hús. Broytist tørvurin, so broytist eisini konseptið.

Størsti trupulleikin hjá privatu miðlunum er tó, at vit kappast móti landskassanum. Vit bíða tí spent eftir tí mentamálaráðharranum, sum hevur rygg til at taka avgerð um, at annaðhvørt missir Kringvarpið rættin til lýsingarpengarnar, ella má kringvarpsgjaldið - og public service sáttmálar - lutast út til aðrar miðlar eisini.

Eitt fólkaræði eigur at hava fría kapping - eisini á miðlaøkinum.

**»» Við mánaðarblaðnum fær Sosialurin tann fjórða miðilin**

## Sosialurin í flashútgávu

Ein av komandi døgunum kemur Sosialurin við eini nýggjari útgávu av blaðnum á internetinum. Talan er um eina útgávu í flash, har tað ber til at lesa prentaða blaðið á internetinum.

Umframt tað at Sosialurin fær digitaliserað blaðið á hendan hátt, so er endamálið eisini at røkka teimum lesarum, sum ikki hava møguleika at keypa blaðið í leysasølu - fyrst og fremst lesarar uttanlands, og verður tað í fyrstu atløgu bert møguligt at lesa blaðið uttanlands.

Tá blaðið fyrsta dagin verður tókt á netinum ber til at keypa eitt eintak, ella at tekna seg sum haldara. Harvið fært tú eisini atgongd til savnið. Í fyrstu atløgu verða øll bløðini aftur til 1. januar 2000 tøk á netinum, og tað ber til at leita í tekstinum í øllum bløðunum.

Soleiðis verður hendan útgávan eisini eitt sera hent amboð hjá teimum, sum vilja leita í gomlum bløðum.




## Kom og dansa í Dansifrøi

Í samband við at Kom og Dansa fær vitjan av Komið og Dansið, Íslandi, skipar áhugabólkurin Kom og Dansa fyri stórum dansidegi í húsinum hjá Dansifrøi leygardagin komandi.

Um dagin skipar Kom og Dansa fyri skeiðum og um kvøldið verður stórt dansikvøld við døgurða og orkestri. Umframt tykkum, eru limir hjá Dansifrøi bodnir við.





**»» Latið Atlantsflog fáa frið**

THOMAS ARABO
KJAK Á SÍÐU 33



**»» Eiga at byrja við semjuni**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 31



## Odd stjórnar nú Eikbanka

45 ára gamli Odd Arild Bjellvåg fekk í morgun sítt veruliga gjøgnumbrot í føroyska samfelagnum. Hann er nýggjur nevndarformaður í Eik Banka, sum er komin í fíggjarligar trupulleikar, og hann leiddi tíðindafundin hjá Eik fyrrapartin.

Odd Arild Bjellvåg er havnarmaður, men eftirnavnið hevur hann fingið frá norska pápa sínum. Odd Bjellvåg eigur grannskoðaravirkið LÍT, sum liggur á Tinghúsvegnum í Havn.

Odd Arild Bjellvåg hevur verið næstformaður í nevndini fyri Eik Banka, men nú Frithleif Olsen er farin frá sum formaður, hevur Odd tikið við leiðsluni í nevndini, sum skal endurreisa bankan. Odd Arild Bjellvåg segði á tíðindafundinum fyrrapartin, at hann kendi seg vísan í, at Eik fór at ríða stormin av, og at eingin vandi var fyri pengunum, sum fólk hava standandi í Eik.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo